## DAGSINS MEINING

# ES valið

Valið til ES tingið er ein sera áhugvaverd og týdningarmikil politisk hending. Valið er áhugavert m.a. tí, at tað í Danmark er eitt stórt stig til vinstru, við tað at Sosialdemokratarnir og SF høvdu risastóra framgongd. S fekk 32,7% og SF fekk 8% av atkvøðunum. Tey valdu eru øll uttan undantak fyri EU. Hetta lesa eygleiðarar sum, at danski vinstravongurin nú ynskir, at tað skal verða rikin ein virkin og framfýsin vinstripolitikkur í Europa. Hetta er sera áhugavert, tí higartil hava vinstruflokkarnir verið rættliga lunkaðir í øllum ES spurningum og hava mestsum hildið seg til eina einvísa mótmæliskós.

Fyri fyrrverandi danska forsætisráðharran Nyrup Rasmussen var valið ein rættilig politisk uppreising í og við, at hann tykist at sláa øll donsk met í persónligum atkvøðum, og við hesum er EU valið samstundis eisini ein dyggur politiskur smeitur fyri donsku stjórnina. Vinstra, sum er flokkur forsætisráðharrans, fer úr fimm niður í tríggjar tinglimir. Hin stóri taparin er junirørslan, har ráðgevin hjá norðatlantsbólkinum, Jens Peter Bonde verður einsamallur tinglimur. Sostatt er valið til ES tingið ein sonn vanlukka fyri junirørsluna og sama er at siga um fólkarørsluna móti ES, sum somuleiðis bert fekk ein tinglim. So er spurningurin, um alt hetta merkir, at danir veruliga hava tikið ES til sín og mótstøðufólkini eru givin á hondum.

Tað er lítið at ivast í, at valið er ein álvarsamur hvøkkur fyri donsku stjórnina. Valið gevur eina ábending um, at donsku velj-ararnir eru um at troyttast av tí politisku kós, sum danska stjórnin rekur. Hinvegin merkir hetta, at Fogh fer at royna at sita í forsætisráðharrasessinum so leingi sum møguligt, tí eitt fólkatingsval vildi verið ein vanlukka fyri Venstre so væl sum fyri DF. Hetta merkir so aftur, at vit sleppa undan einum fólkatingsvalstríði her í Føroyum, og tað er kanska ikki so galið, tí eitt fólktingsval í hesum árinum hevði ivaleyst virkað sera órógvandi uppá føroyskan poltikk í einum tíðarskeiði, har samgongan hevur brúk fyri arbeiðsfriði skal hon fóta sær.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tvey sjálvmál, Sjúrður Skaale

**»Hovedet på blokken«, sum ráðstevnan á Christiansborg tann 25. mai. 2004 kallaðist, hevur skapt eitt óført orðaskifti og tjak.**

**Rolf Guttesen**
*14. juni 2004*



Lat tað vera sagt beinan vegin, at eg meini at tað er heilt í lagi at halda eina slíka konferensu. Tað er einki undirgravandi virksemi ella landsskaðiligt í tí at fáa fólk at siga sína meining um tað, sum tey kanska hava forstand uppá. Og at fáa danskarar og onnur at lurta, og kanska blíva klókari.

Tað er eingin vandi fyri, sum Eilif Samuelsen í viðmerking 04.06.04 sigur, at "indoktrinera danskar politikarar". Marianne Jelved, Frank Jensen og Thulesen Dahl eru alt ov klókir politikarar til at lata seg indoktrinera av sovorðnum.

Men so má tjóðveldisflokkurin eisini taka politisku konsekvensirnar av tí mátanum teir teir, nú arbeiða uppá. Fyrr var tað fý, fý um danskir politikarar søgdu sína meining um fullveldis-sirkussið. Nú fara teir sjálvir niðir fyri biða um stuðul til síni seru sjónarmið. Hetta hava bæði Jóannes Eidesgaars og Bjarni Djurholm víst á.

**Sjúrður Skaale var nakað kvikur, hesuferð!**

Sjúrður Skaale roynir viðmerking 08.06.04 í Sosialinum: "Er Jan Müller blivin klikkaður?" at hava at blaðstjóranum Jan Müller, sum bæði blívur kallaður blindur og politiskur fanatikari.. Jan verður lagdur undir at hótta fólkaræði. Eg haldi hatta vera eina heilt skeiva meting av Jan.

Men Sjúrður, sum royna at leggja monnum lag á, hvussu man skal diskutera á rættan og sámiligan hátt, ger beinanvegin tvey sjálvmál. Sjúrður sigur: **"Nógv av hesum kritikki - td. frá fólki sum Virgar Dalsgaard og Rolf Guttesen - er sjálvsagt ikki verdur at gera viðmerkingar til."**

**Í fyrsta lagi:** Hann fer eftir manninum og gloymir bóltin. Virgar hevur sín serliga, hvassa stíl í tjaki og er sera vitandi um Føroya politisku søgu. Kanska ein tann kønasti á hesum øki. Tað man vera politiskt pínufult at blíva álaður sundur av Virgari. Um mín egna lítla persón skal eg einki siga, eg eri bæði deyvur og dulur.

Tað, sum er sera keðiligt, er at hesin hugburður útilokar sjónarmið, tí at tey eru borin fram av einum Dalsgaard ella Hansen, einum sambandsmanni ella indre-missiónara, einum sosialisti ella post-modernisti, kundi tað verið. Ert tú av tí slagnum, hevur tín meining pr. definitión ongan týdning.

**Har næst:** Rolf Guttesen hevur ikki kritiserað ráðstevnuna á Christiansborg. Eg var ikki har. Men eg hoyrdi Hermann Oskarsson í Danmarks Radio. Hetta var um morgunin týsdagin 25. mai 2004 kl 7.02 á program 2 í stuttari tíðindasending. Hetta er also sama dag sum ráðstevnan, men fleiri tímar áðrenn teir settu á har inni á Christiansborg.

Herman segði við egnari rødd nakrar fáar setningar, sum eg skrivaði niður alt fyri eitt. Teir vóru prentaðir í viðmerking míni í Sosialinum 26.05.04 á síðu 12. Hermann hevur mær vitandi ikki havt nakra rætting til innihaldið.

Eg skal endurtaka hansara orð:

**"Færingerne ved ikke, hvad de skal bruge bloktilskuddet på 1 milliard kroner til; så det er bedst at fjerne det helt.**

**De ved ikke hvad bloktilskuddet skal bruges til, og derfor eksporteres det videre til udlandet.**

**Nogen gange er der for lidt, men andre gange er der for meget.**

**Det kan slet ikke styres."**

Hetta er skrivað eftir minninum. Er tað skeivt, kann Hermann rættað tað. Sjálvandi veit eg, at setningarnir eru kliptir saman av einum longri práti, men hetta eru vilkorini, tá journalistar fara til arbeiðis.

Hetta er tað, sum eg havi gjørt viðmerkingar til, góði Sjúrður, og einki annað. Og eg meini framvegis, at sovorðið svass ikki sømiligt. Hvørki sum økonomur, formaður í Búskaparráðnum, stjóri á Hagstovuni ella tjóðveldismaður eru hesi orð rímilig.

# Nýtt stýri fyri sjálvsognarstovnin Alv

TÍÐINDASKRIV

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur valt stýrið fyri sjálvsognarstovnin Alv.

Limirnir í stýrinum eru Doris Hansen, Bartal Kass, Jóhan Samuelsen, Christian Johannesen og Jóna Olsen. Stýrið skipar seg sjálvt, og stýrislimirnir verða valdir fyri eitt 4 ára skeið.

Stýrið hevur ábyrgdina av at umsita ognirnar hjá Alv og av, at virksemið hjá Alv fíggjarliga verður fyriskipað so væl sum gjørligt.

Endamálið við Alv er at hjálpa arbeiðstarnaðum aftur til arbeiðis. Hetta kann gerast við arbeiðsvenjing, endurbúgving og umskúling.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Ein saklig viðmerking til Búskaparráðið

**Óli Jacobsen**



Tað vísir ein sera dámligan menniskjansligan eginleika, at limirnir í Búskaparráðnum vilja verja sín kroysta formann í hesum tíðum. Men hetta kann vera eitt høvi til at seta nøkur viðurskifti uppá pláss.

Tað, sum er avgerandi í øllum hesum máli, er, at danskir politikkarar so ella so hava lagt seg út í innanhýsis føroysk viðurskifti.

Her ganga øll spor aftur til Hermann Oskarsson. Tað, sum hevur skapt røringina millum føroyskar politikkarar er framløgan, sum verður endurgivin í Berlingske Tidende tann 28. mai, har Hermann verður beinleiðis endurgivin fyri at hava sagt um danska blokkin: "Det er en fantastisk situation. Men gider Danmark fortsat betale til en nation, der har haft store overskud?…"

Hertil svara danskir politikkarar, leysliga endurgivið, at er blokkurin veruliga skaðiligur, so gera vit jú føroyingum ein beina við at endurskoða hann.

Nú aftaná, at hetta hevur skapt alt rokið í Føroyum, sigur Hermann seg vera skeivt endurgivnan. Hertil er bert at siga, at um eg sjálvur hevði verið so skeivt endurgivin, sum Hermann sigur seg vera, og við teimum avleiðingum, sum kundu forútsíggjast, so hevði eg í stundini kravt eina rætting frá blaðmanninum at koma í blaðið dagin eftir, og eg hevði sent rættingina til føroysku fjølmiðlarnar eisini. Tá hevði einki meira hent.

Ikki tess minni so tosar Hermann uttan fyrivarni aftur nakrar dagar seinni við sama blaðmann um fiskimannaskattin, og hevur hetta eftir tí fyriliggjandi sum úrslit, at formaðurin í donsku fíggjarnevndini beinleiðis hóttir føroyskar myndugleikar "uppá blokkin" vegna hetta mál, sum eisini er eitt innanhýsis mál í Føroyum. Júst hetta styrkir ikki undanførslurnar hjá Hermann.

At tey, sum varða av hesum málum, gera bart, hevur einki við avmarking av talufrælsinum at gera. Hetta er ein spurningur, um tað veruliga einki mark skal vera fyri, hvat ein føroyskur embætismaður kann vera orsøk til. Í hesum førinum er tað ein hóttan móti føroyskum sjálvsavgerðarrætti.

Her skal ikki sigast eitt ringt orð um Búskaparráðið. Men hesi eru øll "serfrøðingar" - cand. í einum ella øðrum. Í ráðnum er ikki skuggi av fólki við praktiskum tilknýti til fiskivinnuna. Ein slíkur var í ráðnum fyri nøkrum árum síðani. Hann tók seg úr, og tað kundi verið ein góður spurningur, hvør orsøkin var til tess.

Men hetta forðar tó ikki ráðnum at ráðføra seg við ta vinnu, sum tað hevur so avgjørdar meiningar um. Sambært lógini kann formaðurin víðka ráðið við persónum, sum hava tilknýti til eitt serligt øki. Hetta hevur hann ikki gjørt. Niðurstøðurnar verða sjálvsagt hareftir.

Tá ein lesur t.d. frágreiðingina fyri 2003, so er tað sum at lesa eina búskaparliga lærubók ella høvuðsuppgávu hjá einum, sum skal hava endaligt prógv. Alt er antin svart ella hvítt. Ber ein fyritøka seg ikki, so skal hon fara á húsagang, basta! Her ger tað ongan mun, um virkið er landfast, og at tað kann byrja aftur við øðrum eigarum, ella talan er um eitt skip, sum fer av landinum med alla.

Tað verður als ikki tikin hædd fyri, at tað er eisini nakað, sum eitur gerandisdagur á økinum. Tað tykist greitt, at Búskaparráðið metir síni sjónarmið sum bíbilskar sannleikar, sum eingin skal kunna seta spurnartekin við. Tað er sjáldan, at viðurskiftini í einum gerandisdegi eru so einføld.

**Skeivar grundgevingar um fiskimannaskatt**

Taka vit t.d. málið um fiskimannaskattin, so er hetta á sama hátt. Grundgevingarnar eru sera eintáttaðar. Onkur sjónarmið kunnu vera røtt, meðan onnur eru ivasom og aftur onnur beinleiðis skeiv. M.a. verður sagt, at fiskimannaskatturin sum frálíður fer at gera tað, at reiðararnir fáa bíligari arbeiðsmegi. Hetta er púra skeivt. Hetta kundi verið rætt, um fiskimenn fingu t.d. mánaðarløn og tað skuldi verið samráðast um eina slíka annaðhvørt ár. Tá kundi skattaskipanin ávirkað lønarkrøvini.

Men fiskimenn fáa jú ein prosentpart av veiðini, og so leingi hesin verður fasthildin, er ikki grundarlag fyri hesum sjónarmiði. Í veruleikanum er parturin hjá fiskimonnum øktur síðan fiskimannaskattin, og tekur tað eisini grundarlagið undan umrøddu grundgeving.

Men grundað á hesa skeivu niðurstøðu verður komið til eina aðra skeiva niðurstøðu. Nevniliga at við bíligari arbeiðsmegi fáa reiðararnir áhuga fyri at seta fleiri fiskimenn í starv enn neyðugt, og hetta minkar tískil um arbeiðsmegina í øðrum vinnugreinum. Hetta sjónarmið er eisini prógv um eina grundleggjandi manglandi vitan um lønarskipanina við fiskiskipum. Tá reiðarar kortini gjalda sama prosentpart - uttan mun til manningartal - er tað als ikki í teirra áhuga at seta fleiri fólk. Hinvegin virkar skipanin á tann hátt, at skiparar, sum eru teir, sum seta fólkið, hava áhuga í at hava fægst møguligar mans við, tí meira verður tá í part uttan mun til skatt ella ikki.

Ráðið hevur eisini útihýst ta mest ítøkiligu grundgevingina fyri fiskimannaskattinum. Nevniliga at eggja fiskimonnum til at búgva í Føroyum, samstundis sum teir útvega sær arbeiði á útlendskum fiskiskipum. Hetta vildi økt um okkara arbeiðsmarknað og talið á arbeiðsplássum, sum tað kann vera tørvur á, ikki minst í hesum døgum.

**Hvat um Búskaparráðið tók í egnan barm?**

Mannagongdin hjá Búskaparráðnum tykist at vera tann sama sum við serføroyskari løgfrøði. Byrjað verður við niðurstøðuni, og so skulu grundgevingarnar lagast til hana, uttan mun til um tær eru rættar ella ikki.

Tað er ikki so løgið, at fiskivinnan og fiskimenn ivast stórliga í Búskaparráðnum og meta tað at vera eitt slag av hóttan móti tess áhugamálum. Fólkini í fiskivinnuni eru nú ikki so eiðasør, sum ein kann fáa fatan av. Tað vóru vit, sum fyrst og fremst fingu skipað fyri marknaðarbúskapi í flakavinnuni seinast í 80-unum.

Heldur enn hetta sjálvrættvísi kundi Búskaparráðið tikið í egnan barm. Tað kundi spurt seg sjálvt, um tess arbeiðsháttur og stílur ikki er tann veruliga orsøkin til ta støðu, sum hevur fingið ráðið út í hesa bjargingarroyndina av formanninum.

Hetta kundi verið eitt gott evni til komandi fund hjá ráðnum. Nevniliga hvussu ráðið sjálvt kann forða fyri at koma í eina slíka støðu aftur.

# Búskaparráðið mótmælir

**Nýggjastu álopini á formannin í Búskaparráðnum eru ósømilig og eiga ikki at koma fyri í einum framkomnum samfelag. Við hesum mótmælir Búskaparráðið viðferðina, sum Hermann Oskarsson, formaður, hevur fingið frá einstaklingum og fjølmiðlum seinastu vikurnar.**

Limirnir í Búskaparráðnum vilja við hesum mótmæla teirri viðferð, sum formaður ráðsins, Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur, hevur fingið, eftir at hann herfyri helt fyrilestur um búskaparligu viðurskiftini í ríkisfelagsskapinum. Politikarar, landsstýrismenn, umboð fyri fakfelag og einstaklingar hava í fjølmiðlunum ákært Hermann Oskarsson fyri bæði líkt og ólíkt, m.a. at hann er landasvíkjari og rennur politisk ørindi.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at formenn Búskaparráðsins fáa slíka viðgerð frá politikarum, landsstýrismonnum, formonnum fyri vinnu- og fakfeløgum og øðrum. Fyrrverandi formaður ráðsins varð eisini fyri slíkari hunddálking.

Vit hava so stórliga brúk fyri, at óheftir stovnar og ráð – eins væl og øll onnur – sleppa framat í almenna orðaskiftinum, uttan at skula vænta sær at verða álopin persónliga. Álop sum í roynd og veru køva talufrælsið og harvið fólkaræðið í landinum. Sum hetta málið er handfarið seinastu vikurnar, er vandi fyri, at alt færri fólk fara at tora at seta spurnartekin við, hvussu vit hava valt at innrætta okkara búskap, og alt færri fólk fara at tora at seta kikaran fyri hitt atfinningarsama eygað.

Hetta má undir ongum umstøðum gerast úrslitið!

Uppgávan hjá Búskaparráðnum er at veita óhefta ráðgeving, bygda á búskaparfrøði. Harvið kemur ráðið við hvørt at seta spurnartekin við viðurskifti, sum sæð frá einum búskaparligum sjónarmiði kunnu vera óheppin, men sum nøkur fata sum álop á vunnin rættindi. Í staðin fyri sakliga at viðgera búskaparligu grundgevingarnar hjá ráðnum, verða orð ofta løgd ráðnum í munnin, sum ráðið hvørki hevur sagt ella hugsað, ella verður farið eftir persónum í ráðnum heldur enn eftir innihaldinum í tí, sum sagt verður.

Ráðið verður t.d. javnan lagt undir at hava ta hugsan, at blokkstuðulin annaðhvørt er beinleiðis skaðiligur, ella at hann kann takast burtur úr búskaparliga renslinum uttan ávirkan á føroyska búskapin. Hvørki er satt. Eisini verður ráðið lagt undir at siga, at fiskivinnan mestsum er óneyðug fyri búskapin, og at vit kunnu liva av at klippa hvørjum øðrum. Heldur ikki hetta er í tráð við hugsan ráðsins. Men ráðið hevur - bæði tá tað kemur til blokkin, og tá tað kemur til fiskivinnuna - lagt nøkur saklig sjónarmið fram um, hvørja ávirkan ávikavist blokkurin og fiskivinnan hava, eins og ráðið hevur roynt at seta hesi inn í eitt landsbúskaparligt høpi, sum stundum víkir frá fatanini millum manna av, hvussu búskapurin virkar. Víst verður til frágreiðingar ráðsins.

Búskaparráðið fer framhaldandi í skrivligu frágreiðingum sínum at úttala seg fakliga um viðurskifti, ið viðvíkja føroyska búskapinum, og vóna vit at innihaldið í frágreiðingum ráðsins í framtíðini í størri mun enn higartil verður partur av almenna orðaskiftinum.

Búskaparráðið hevur á hvørjum ári bjóðað sær til at leggja frágreiðingar sínar fram fyri almenningin (vinnu- og fakfeløgum, politiskum flokkum, fyritøkum o.ø.). Øll, sum hava áhuga, kunnu venda sær til ráðið at fáa útgreinaðar frágreiðingar ráðsins. Á tann hátt kunnu helst fleiri misskiljingar beinast av vegnum.

**Búskaparráðið:**
Gunvør Balle
Miriam Haraldsen
Marner Jacobsen
Anna Kass
Óli Samró

# Tolir sannleikin ikki dagsins ljós er okkurt galið

**Jógvan Jacobsen**
*landsnevndarlimur Unga Tjóðveldisins*

*Búskaparligu viðurskifini í landi okkara skulu dyljast sum mansmorð, danir skulu einki vita. Okkurt er, sum ikki tolir dagsins ljós. Ella høvdu sambandsfólk ikki leikað soleiðis í.*

Fólk eru rættiliga farin at renna ørindi fyri okkara landsins stjórnarsamgongu, Sambandsgonguna ABC. Tað skilst á øllum brøgdum.

Á ráðstevnu í Danmarkar høvuðsstaði varð ráðstevna hildin, har m.o. føroyskur serfrøðingur segði sína hugsan um føroysk búskaparlig viðurskifti.

Hetta fekk øði í føroysk sambandsfólk. Danir skulu einki vita, hóast teir árliga senda okkum 615 milliónur krónur afturfyri okkara fullveldi. Danir skulu einki innlit fáa í føroysk búskaparlig viðurskifti. Kanska onkur politikkari, men ikki pressan og ikki fólkið.

Hvat er tað, sum ikki tolir dagsins ljós? Hvat er tað, sum er so fúlt og skitið, sum danska pressan ikki má finna? Hvat vita Sosialurin og Dimmalætting, sum Føroya fólk ikki veit?

Okkurt er. Ella høvdu føroysk sambandsfólk ikki leikað soleiðis í, tá donsk pressa fer at grava. Onkur grund er til, at professionell tíðindafólk ikki mugu sleppa framm at.

Okkurt er, sum ikki tolir dagsins ljós.